# – hvat fæst í Føroyum?

**Haute Couture** klæðir eru vanliga seymað úr sera góðum og dýrum tilfari. Ofta verða serligir hættir av tíðarkrevjandi handseyming nýttir, fyri at leggja veruligan dent á vakrar detaljur.

Kelda: Wikipedia

*Hóast klæðini, ið víst verða á Haute Couture sýningunum kring heimin, ofta ikki eru nýtilig í føroyska gerandisdegnum, ber tó til at síggja hvønn veg rákið ber, og hvat vit kunnu vænta okkum komandi tíðina.*
*At keypa Haute Couture kostar nógv – heilt nógv. Men tíbetur kunnu vit eisini vera við í nýggjasta móta uttan at seta húsini í veð.*
*Vit hava verið úti og hugt, hvat fæst í Føroyum…*

Jakkar til mannfólk hava eisini broytt skap. Eins og hjá kvinnunum, skal eingin rond vera, sum strammar jakkan inn, hvørki um miðjuna ella um ermarnar. Longdin er eisini vorðin eitt vet síðari, og vit síggja harumframt nógvar dupultknappaðar jakkar



Gráur dupultknappaður jakki úr ull frá Thomas Burberry, Skálkur: 2999,-



Síður svartur jakki við lekrum detaljum frá Day Birger et Mikkelsen, Tiger: 2999,-



Svartur jakki við knappum frá Junk De Luxe, Handilskjarnin: 1199,95



Tjúkkur, svartur toyjakki við fóðrið frá Canson, JAP: 999,-

Bundnu pløggini síggjast allastaðni – eisini hjá monnunum. Troyggjurnar til menn skulu tó beint øvugt av kvinnupløggunum vera strammar og sita tætt at kroppinum. Alt er loyvt – bæði frá einlittum klassiskum til smámynstrut stuttligt til stórmynstrut hippie



Opin smámynstrut troyggja frá Selected, Jack & Jones: 499,95



Myrkablá dupultknappað troyggja frá Samsøe&Samsøe, Skálkur: 899,-



Grá, opin, fóðrað troyggja við stórum mynstri frá Iceman: 699,-



Mynstrut bundin troyggja í myrkamorreyðum og hvítari ull, Sirri: 895,-

Hóast mótin fyri tað mesta er klassiskt skorin og í dimmum litum, eru tó eisini nøkur sprøkl av 80'ara litunum at síggja. Her hava vit loyvi at spæla og eksperimentera, og m.a. blusir og hettutroyggjur eru perfektar til at dyrka stuttleikan frá glaðu 80'unum



Grá hettutroyggja við pink og bláum mynstri frá Junk de Luxe, Handilskjarnin: 699,95



Grøn hettutroyggja við gulum toruskíggjum frá Bjørkvin, Juniik:649,-



Svørt hettutroyggja við gulum mynstri frá DND, JAP: 499,-



Myrkablá og turkis hettutroyggja frá Blend, Kallkyn: 429,-

Buksurnar til mannfólk hava framvegis gularótasnið. Tær eru strammar, og skulu sita tætt. Á nógvum av fremstu mótapallunum eru tær eisini so stuttar, at tær á góðum føroyskum máli »flagga«



Bláar cowboybuksur frá Tiger of Sweden, Skálkur: 1299,-



Gráar cowboybuksur frá Lindeberg, Handilskjarnin: 1099,95



»Skitnar« cowboybuksur frá Diesel, Deres: 1549,95



Myrkar buksur frá Solid Jeans frá Solid Jeans, Trend Floor: 500,-